Marius Johannesen

Tá ið jólamaðurin fekk liðagikt sjálvan jóladag

Leikarar:

Jólamaðurin _____

Kona hansara _____

Hanus og _____

Janus (synir teirra) _____

Kongur _____

Drotningin _____

Prinsessan _____

Próstakonan Berg _____

Herovastin Ankarson _____

Hermaðurin Krúna _____

Lisa (kona hansara) _____

En tænari _____

Eitt sindur um sjónleika-venjing við børnum

Fyrst verður leikurin lisin upp í síni heild. Roynt verður at gera leikin so spennandi hjá børnunum sum gjørligt.

Síðani verður ein mynd vand í senn. Børnini kunnu spæla ein part nakrar ferðir við ongum handriti (improvisatión), har børnini skiftast at hava teir ymsu leiklutirnar. Um lærarin velur »skeivt« fyrstu ferð, kann tað verða trupult at skifta seinni og ikki særa okkurt av børnunum.

Tá ið børnini hava spælt leikin nakrar ferðir og hava *skilt gongdina* í leikinum, verða leiklutirnir ásettir og handrit býtt út. — Nú verður heitt á børnini um at læra seg leiklutin uttanat.

Nú er so at vóna, at børnini sjálv duga at síggja, at summi hóska best til ein leiklut, onnur til onkran annan.

Tað hevur eisini stóran týdning at fáa børnini at skilja, at allir leiklutir eru týdningarmiklir; tey, sum arbeiða aftanfyri á pallinum, har alt skal gerast stundisliga og stillisliga, hava eins stóran týdning og tey, sum standa á palli.

Tað er heldur ikki bara tey, sum siga okkurt beint nú — ella skulu siga nógv í leikinum — sum eru týdningarmikil. Ein, sum hevur ein lítlan leiklut, kann leggja nógv afturat leikinum, um hann spælir væl í røttu løtu. Ein, sum hevur ein lítlan leiklut, kann taka nógv frá leikinum, um hann dregur ov nógv eygu at sær, tá ið hann ikki skal.

Fyrstu ferð, ið vant verður rættiliga á palli, skulu børnini læra at arbeiða aftan fyri pallin og ikki larma. Tað loysir seg at brúka nógva tíð til at venja hetta.

Royn skjótast gjørligt at áseta, hvar leikarin skal ganga og standa, tá ið hann skal siga okkurt. Tá festa setningarnir seg betur, og leikararnir vera tryggari.

Ven børnini frá byrjan at venda sær ímóti áskoðarunum, tá ið tey tosa, og at tosa *nógv* harðari og týðiligari, enn tey halda seg skulu.

Hini børnini kunnu fara oman í salin at eygleiða og lurta, um tað hoyrist nóg væl.

Royn at fáa børnini *ikki* at skunda sær. Onkuntíð hevur tað, at steðga á, mest at siga.

1. partur

Í vættrastovuni

Vættra-konan: *(Vættrakonan fer yvir í vindeygað og kagar út)* Nú mátti pápi tykkara brátt farið at komið aftur. Eg eri eitt sindur bangin um hann. Hann var ikki rættiliga væl til passar, hann fór. *(kagar út aftur gjøgnum vindeygað)* Nú kemur hann niðan brekkuna. Neyðardýrið, hann gongur so tungan – hann sær ógvuliga ússaligur út. Farið og latið honum upp, dreingir. *(Hanus og Janus leypa yvir at hurðini og lata pápanum upp. Pápin kemur inn, tveitir ein posa frá sær og setur seg eymkandi í stólin, sum vættrakonan førkar til hansara.)*

Vættra-konan: Hvussu veit tær við, vælsignaður?

Vættra-bóndin: *(situr og venar seg)* Oy, oy, tað eru lendarnar! Tað er, sum ein knívur skuldi staðið inn ímillum geislarnar! Hetta kom illa við, at giktin skuldi koma sjálvan jólaaftan! Oy! Oy! Oy! Sum eg havi ilt!

Vættra-konan: *(Leggur ein kodda aftan fyri lendarnar á honum og ballar eitt teppi um beinini)* Bíða nú, góði pápi, tað ræður um at halda teg heitan, so man tað fara at javna seg um einar tveir dagar.

Vættra-bóndin: Um einar tveir dagar! Veitst tú ikki, at tað er jólaaftan í dag? Og allir jólapakkarnir eru ikki útbornir enn. Fleiri eru eftir í posanum, og eg orki ikki út aftur í kvøld. Hvussu skal so vera vorðið. Á tann standur, tann standur!

Vættra-konan: *(kínir honum troystandi)* Bíða nú, maður mín! Onkur ráðini vera. Tey mugu fyrr enn ikki bíða eftir pakkunum til millum jólanna.

Hanus: *(grammur)* Pápi, kunnu Janus og eg ikki fara við pakkunum?

Janus: Ja, pápi, góði pápi lova okkum!

Vættra-bóndin: Tað man ikki fara at bera til. Tit vita ikki, hvar tit skulu fara. Tað verður bara ein ræðulig fløkja burtur úr tí, um tit fara. Á, lendarnar, lendarnar!

Vættra-konan: Góði maður mín, tú orkar jú ikki sjálvur, og fegin vilt tú, at øll skulu fáa pakkarnar í kvøld. Dreingirnir hava eisini fleiri ferðir verið við og hjálpt tær, so eg ivist ikki í, at teir duga.

Hanus: Vit kunnu royna, pápi! Vit skulu leggja okkum ógvuliga nær.

Janus: Vit skulu gera tað besta, vit kunnu, tað er onki við at gera.

Vættra-bóndin: Tað er helst onki annað at gera. Far mær eftir posanum! *(Hanus fer eftir posanum og setur hann við stólin hjá pápanum. Pápin roynir at taka pakkarnar upp úr, men dettur við róp afturá aftur í stólinum)*

Hanus: Vit skulu hjálpa tygum, pápi.

Janus: Ja, pápi, lat okkum hjálpa!

Vættra-konan: *(tekur ein pakka upp úr posanum og rættir Janusi)* Fá pápa tínum!

Vættra-bóndin: *(lesur)* Til kongsborgina. Kongsborgina finna tit dreingir?

Hanus og Janus: Ja, ja, meir enn so!

Vættra-bóndin: Hetta er ein nýggj krúna til kongin, eitt hálsband til drotningina og ein lítil dukka til lítlu prinsessuna.

Janus: *(rættir honum ein annan pakka)* Hesin pakkin er bæði stórur og tungur, pápi.

Vættra-bóndin: Lat meg síggja. Hetta er til gamla hermannin Krúna. Hann fær einar nýggjar stivlar í jólagávu. Og kona hansara, Lisa, fær eitt fyriklæði. Abbasonur teirra, Per, er hjá teimum um jólini, hann fær einar skoytur, sum hann hevur ynskt sær. Tey búgva uppi á Gørðum.

Hanus: Eg veit, pápi, eg veit, tað er hinumegin ánna.

Vættra-bóndin: *(Dettur afturá í stólin og eymkar seg)*

Vættra-konan: *(tekur ein bleytan pakka og lesur)* Próstafrúan Berg, Lítlu Tvørgøtu 2. Og so er bara ein pakki eftir. *(lesur)* Herovastin Ankarson.

Janus: Eg veit, eg veit! Próstafrúan og herovastin búgva í sama húsi!

Vættra-bóndin: Próstafrúan býr eina trappu upp vinstrumegin, og herovastin høgrumegin í somu hædd.

Hanus og Janus: Vit vita, vit vita *(Hanus tekur posan á bakið. Janus gongur aftaná og heldur í posan)* Nú fara vit. Vit vera aftur um eina løtu.

Vættra-bóndin: Hevði tað nú bara eydnast í øllum góðum, tað vildi eg!

Vættra-konan: Tað man alt fara at laga seg til tað besta. Grem teg onki um tað. Nú skal eg geva tær nakrar giktdropar, so man pínan fara at gevast. *(Tekur eitt glas og telur honum tjúgu dropar í eina skeið og gevur honum. Hann svølgir droparnar og leggur seg aftará í stólinum. Vættrakonan setur seg hjá honum við kettuni í fanginum.)*

2. partur

Hanus og Janus koma gangandi, seta posan frá sær og taka tann stóra pakkan uppúr.

Janus: Hvør var tað, sum átti henda?

Hanus: Ja, hvør var tað? Lat meg vita at lesa. *(Stavar)* K-r-ú-n-a. Tað man vera kongurin. Hann skuldi jú fáa nýggja kongskrúnu.

Janus: *(Tekur hin stóra pakkan)* So er tað hesin, sum skal niðan á Garðar. Vit goyma posan og leypa av stað við hesum báðum fyrst, so kunna vit fylgjast í Lítlu Tvørgøtu seinni. *(Teir krógva posan og strúka avstað hvør sín vegin. Eina løtu seinni kemur Hanus aftur og fer eftir posanum. Í somu løtu kemur Janus leypandi.)*

Hanus og Janus: So var hetta í lagi.

Hanus: So eru bara próstafrúan og herovastin eftir, tað er skjótt at leypa yvir til teirra.

Janus: Og so heim til pápa og mammu, og so at súpa jólagreytin!

Hanus: Herovastin átti tann bleyta pakkan.

Janus: So eigur próstafrúan hin sjálvandi.

Hanus: Óført sum tú ert klókur!

Janus: Á, vit eru ikki so býttir, sum tey halda, vit báðir! Kom, lat okkum fara. *(Teir taka posan og fara).*

3. partur

Prósta-frúan: *(Situr við jólapakkanum í fanginum og strýkur honum við hondini)* Á, tann fíni paki! Hann man helst vera frá góðu dóttur míni, ongantíð gloymir hon mammu sína. *(Brýtur varisliga pakkan upp, og út kemur ein pípa og ein tubbakspakki)* Ein pípa! Og tubbak! *(flennir)* Ætla tey nú, eg skal fara at roykja í aldurdóminum? Hatta var løgið, kortini. *(Tað pikkar uppá, og inn kemur Ankarsson kapteynur. Próstafrúan flennir, vísir honum pípuna).* Hyggið hvat ið eg fekk í mínum jólapakka! Nú kunnu kapteynurin og eg fáa okkum mangt hugnaligt prátið, meðan vit fáa okkum eina nátturðapípu bæði.

Kapteyn.: *(Leggur eitt sjal um herðarnar)* Ikki talan um. Eg eri fínari enn so, enn at eg royki pípu! Eg ætli mær at sita í einum góðum hvílistóli og hekla við fína sjali um herðarnar! *(bæði grína)*

Prósta-frúan: *(rættir honum pípuna og tubbakið)* Havi kapteynurin heldur hetta. Tað klæðir honum kortini betur enn at sita og hekla.

Kapteyn.: *(tekur sjalið og leggur tað um herðarnar á próstafrúnni)* Og sjalið klæðir avgjørt tygum betur enn mær. Guð viti, hvat jólamaðurin hevur hugsað í kvøld.

Prósta-frúan: Men hetta var bara stuttligt kortini. Nú haldi eg, at eg fari at seta kaffikannuna útá, so kunnu vit fáa okkum ein jólamunn, og eitt lítið prát bæði.

Kapteyn.: Takk skulu tygum hava, tað er ov mikið; men gott hevði verið at fingið ein kaffimunn ella eitt lítið prát, so mikið góðan kenna tygum meg.

4. partur

Hermaðurin Krúna, Lisa og lítli Per sita við borðið. Á borðinum liggur stórur pakki.

Krúna: *(lesur)* Til slottið. Ikki eiti á! Nú kalla tey lítlu smáttu okkara slott. Tað sigi eg! Men satt er tað Lisa, vit bæði vildu ikki skift hana um fyri kongsslottið, um tað stóð í boði.

Per: *(grammur)* Brót pakkan upp abbi, so vit fáa at síggja, hvat ið er í honum!

Krúna: *(brýtur upp, og út koma tríggir smærri pakkar, lesur)* Til kongin. Sjálvandi er tað eg, sum eri kongur á Gørðum. So hetta eigi eg. Og hygg her: Til drotningina. Jú, jú, Lisa. Tað gongur frameftir hjá okkum báðum! *(rættir henni pakkan og nígur)*

Lisa: Hetta man vera onkur, sum ger gjøldur burtur úr okkum.

Per: Eigi eg pakkan, sum eftir er? Tað eigi eg vist. *(Tekur pakkan og brýtur upp, lesur ikki)* Ein dukka! Hvat skammin er hetta? Hvat skal eg gera við eina dukku? Hetta er ikki, sum tað skal. *(tveitir dukkuna frá sær)*

Krúna: *(hevur brotið sín pakka upp og gløðir við, nú hann sær krúnuna. Setur hana varisliga á høvdið framman fyri speglinum)* Nei, vælsignað, ikki ber til. Tá klæðir gamla soldatarhúgvan mær ólíka betur. Ikki skal Krúna ganga við krúnu.

Lisa: *(rættir eina hálsketu fram)* Her er okkurt galið. Nær skuldi eg kunnað gingið við so fínum hálsbandi?

Per: Omma, omma! Pakkin er helst ætlaður til kongsslottið! *(tekur pappírið, sum var uttan um dukkuna)* Ja, her stendur tað skilliga: Til prinsessuna.

Lisa: Vælsignað verið tit! Vit mugu pakka saman aftur og bera tað so í bandi, at kongur, drotning og lítla prinsessan fáa pakkarnar í kvøld.

Krúna: Tað er sjálvandi. Fáið nú pakkan saman aftur. So geri eg meg til at fara niðan á kongsslottið beinan vegin.

5. partur

Kongur, drotningin og prinsessan sita hvørt í sínari trónu, og fult av jólapakkum liggur uttan um tey. Ein tænari kemur inn við stórum pakka, fer yvir til kong, nígur djúpt og fær honum pakkan.

Kongur: *(brýtur pakkan upp og út koma tríggir smærri pakkar, tekur ein og lesur)* Til móður. *(rættir drotningini)* Hesin er til tín. Tú ert jú móðir at øllum landinum.

Drotning.: Hvat man hetta vera? *(brýtur pakkan upp)* Eitt fyriklæði! *(bindur tað upp fyri seg)* Hygg, hvussu fín eg varð nú! *(flennir)*

Kongurin: Hatta var stuttligt. Hvør man hava sent tær hatta? Hatta klæðir tær óføra væl.

Drotning.: Ja, eg haldi, eg fari at vera í tí á slotsveitsluni í næstu viku. Men har eru jú fleiri pakkar. Kanska tú eisini hevur fingið okkurt fínt at vera í í veitsluni.

Prinsessan: Sessan lítla vil eisini hava okkurt júst til veitsluna.

Kongurin: *(lesur)* Til tað minsta í húsinum. Tað man vera til tín lítla sessan.

Prinsessan: Gev mær tað, gev mær tað! *(Hon pakkar ógvuliga forvitin upp, og út koma einar skoytur og ein bóltur, klappar saman hendur og fer fram á gólv við skoytunum)* Sessan skal skreiða á ísinum.

Kongurin: Tað var ikki eiti á sessan, nú kanst tú fara til skoytukapping fyrsta dagin, men hvat man eg sjálvur fara at fáa? *(lesur)* til Krúna *(flennir)* Eru tey nú farin at kalla meg Krúna! Tað hevði verið fyri neyðini, at tað var ein nýggj kongskrúna, eg fekk, hin gamla er so illa farin.

Drotning.: Eg haldi, tað er ikki, sum tað skal við hesum pakkum.

Kongurin: *(pakkar einar stivlar upp, klappar sær á knøini og flennir)* Einir stivlar! *(letur seg í teir og fer upp á gólvið at dansa, tekur drotningina og prinsessuna upp í at dansa og øll kvøða):* Nú eru aftur jól, og nú eru aftur jól, og kongur hevur nýggjar stivlar. Og drotningin er fín, og drotningin er fín við nýggjum fyriklæði um miðju. Prinsessan er so glað, prinsessan er so glað, tí hon fekk einar nýggjar skoytur! *(Tað bankar á dyrnar.)*

Tænarin: *(nígur)* Ein gamal maður er her úti; hann vil tosa við tygara hátign.

Kongurin: Bið hann koma inn.

Krúna: *(Ger hermannaheilsan fyri kongi, drotning og prinsessuni)* Orsaki meg, harra kongur, her havi eg ein jólapakka, sum er skeivt fyrikomin. Ætlanin mundi vera, at hann skuldi verða borin higar niðan á slottið; men so kom hann í staðin fyri til okkum uppi á Gørðum. Eg veit ikki, hvat vættrabóndin hevur hugsað. *(Leggur pakkan frá sær og heilsar aftur).*

Kongurin: Íðan, vælsignaður maður, so munnu tykkara pakkar vera komnir til okkara. Hesir stivlarnir munnu vera ætlaðir tær. *(fær Krúna stivlarnar)*

Drotning.: *(fær honum fyriklæðið)* So man hetta vera til konu tína. Og sessan má lata skoyturnar og bóltin frá sær. Tey eigur helst lítli abbasonur tín, haldi eg. Nakað glaður verður hann.

Prinsessan: Men sessan vil sleppa at standa á skoytum!

Kongurin: Bíða nú, góða barnið. Tú fært skoytur til næstu jól.

Prinsessan: *(gevur honum skoyturnar og bóltin)* Veri so góður! *(við kongin)* Vera tær nýggju skoyturnar líka fínar sum hesar?

Kongurin: Ja, ja, barn mítt, tað veitst tú. Og tú skalt fáa nýggjar skreiðistivlar, og mamma skal gera tær nýggj kavaklæði. *(Við Krúna)* Og aftur fyri ómakin, mást tú fáa eina lítla samsýning, veri so góður.

Krúna: Takk, tygara hátign. *(nígur)* Gleðilig jól, øll somul!

Kong., drotn. og prinsessan: *(veittra til Krúna)* Gleðilig jól! Og heilsa heima á Gørðum. *(Tey fara at bróta nýggju pakkarnar upp)*

Kongurin: *(setur krúnuna á høvdið)* Hygga síggj! So fekk eg nýggja krúnu kortini! Men stivlarnir vóru eisini góðir, tað má eg siga. Og so fekk eg ein góðan látur eisini.

Drotning.: *(hevur fingið sær hálsbandið um hálsin)* Tað skalt tú hava rætt í. Hetta má sigast at hava verið ein stuttligur jólaaftan. Lat okkum nú síggja, hvat lítla sessan hevur fingið. Eina dukku! Tað má eg siga, tað var ikki eiti á!

Prinsessan: *(tekur dukkuna í favn)* Hon skal eisini hava nýggj kavaklæði og skoytur!

Allir leikararnir: *(koma inn á pallin og níga)*
Tá ið alt endar væl, so er frálíkt!